# Reglugerð fyri vinningsbýti til limir í Ognarfelag Tryggingartakaranna

Ognarfelag
Tryggingartakaranna

Vísandi til viðtøkur hjá Ognarfelagið Tryggingartakaranna (hereftir OT), §30, stk. 4, setur nevndin, samsvarandi góðkenning frá aðalfundi tann 21. apríl 2016 og seinast dagførd á aðalfundi tann 08. apríl 2022, hesa reglugerð í gildi.

**§ 1 Vinningsbýti**
Allir tryggingartakarar í Betri Trygging, sum hava fastan bústað ella heimstað í Føroyum, eru limir í OT og hava rætt til møguligt vinningsbýti.

Vinningsbýti verður ásett sambært einari meting av ársúrslitinum hjá OT farna árið við atliti til, at kapitaltilbúgving felagsins til eina og hvørja tíð er í lagi, og at nóg mikið av gjaldføri er til at nøkta verandi og komandi skyldur felagsins.

Tað er nevndin hjá OT, ið ger hesa meting.

Tá mett verður, at tað er grundarlag fyri at gjalda út vinningsbýti til limir felagsins, leggur nevndin fram uppskot um hetta til ársaðalfundin til støðutakan.

Aðalfundurin kann ikki taka avgerð um at luta út hægri vinningsbýti enn tað, sum nevnd felagsins hevur skotið upp ella tikið undir við, jb. grein 180 í vinnufelagslógini.

**§ 2 Rættur til vinningsbýti**
Limir, ið hava rætt til vinningsbýti, verða allýstir soleiðis:
Allir limir sum:

- eru kundar og hava havt virkna trygging, í Betri Trygging undanfarna árið, og
- eru kundar og hava virkna trygging í Betri Trygging á degnum fyri ársaðalfundin hjá OT í útgjaldsárinum, og
- hava fastan bústað ella heimstað í Føroyum.

Vinningsbýti verður goldið til tann, ið er at meta sum tryggingartakari í løgfrøðiligum týdningi. Hetta merkir, at fyri privatpersónar verður vinningsbýti útgoldið til tann, ið stendur sum tryggingartakari á tryggingarskjalinum og fyri feløg verður vinningsbýti útgoldið til felagið sjálvt.

Av umsitingarligum orsøkum er tað somuleiðis ein treyt fyri útgjaldi, at limirnir í seinasta lagi tann 30. november í tí roknskaparárinum, har Umboðsráðið á aðalfundi hevur tikið avgerð um at útgjalda lima-krónur, hevur latið felagnum p-tal ella v-tal, umframt kontonummarið, har útgjaldið skal flytast.

Um felagið ikki hevur móttikið hesar upplýsingar til ásettu freist, fellur útgjaldið aftur til felagið.

**§ 3 Útrokning av vinningsbýti**
Vinningsbýti verður roknað út fyri hvønn kunda einsæris, og verður grundað á samlaða innvunna tryggingargjaldið frá kundanum undanfarna ári. Útgjaldið verður býtt eftir lutfallinum millum tryggingargjøldini hjá einstaka kundanum í mun til samlaðu tryggingargjøldini í Betri Trygging undanfarna árið.
Vinningsbýti undir 200 krónir verður ikki útgoldið.

**§ 4 Skattur**
Skattligu avleiðingarnar av útgoldnum vinningsbýti eru felagnum óviðkomandi.

**§ 5 Gildiskoma og avtøka**
Hendan reglugerð hevur gildi, tá hesar eru samtyktar á aðalfundi.

Broytingar í reglugerðini kunnu fremjast, tá nevndin í OT hevur tikið avgerð um hetta og broytingin er góðkend á aðalfundi í OT.